## Dagstovnin á Argjum
Traðagøta 55 · 160 Argir

# Pedagogar

## til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir pedagogum bæði til vøggustovu og barnagarð at byrja 1. juli 2008 ella eftir nærri avtalu. Møguleikar eru eisini fyri at kunna arbeiða niðursetta tíð.

Um ongin pedagogur søkir, eru onnur, sum hava áhuga at arbeiða innan fyri dagstovnaøkið, vælkomin at søkja.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019 ella 319019 lokal 10. Kunning er eisini á heimasíðu okkara www.dstargir.fo

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 21. juni 2008.

# 2 pedagogar

## til forskúlastovuna á Dagstovninum á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir 2 pedagogum til forskúlastovuna at byrja 1.juli 2008 ella eftir nærri avtalu. Møguleikar eru eisini fyri at arbeiða niðursetta tíð.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019 ella 319019 lokal 10. Kunning er eisini á heimasíðu okkara www.dstargir.fo

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 21. juni 2008.





Bátar til ein hvønn tørv

**Les meira á www.meklarin.fo**

**HP. MARINE · SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 219450 · fax 449191 · hpe@kallnet.fo



# Barnaverndartænastan

fyri: Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

## Leiðari til Barnaverndartænastuna

**Fyri: Sørvágs,- Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur**

Lýst verður eftir avloysara fyri leiðaran á Barnaverndartænastuni. Talan er um eitt farloyvisstarv fram til 1. mai 2009, ið verður lýst til setan 1. august 2008 ella sum skjótast hereftir.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni í Sandavági og nakað av ferðing má roknast í starvinum.

Arbeiðsøki er Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur umframt Tórshavn.

**Uppgávur og avbjóðingar:**
- leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Barnaverndartænastuni
- leiðarin hevur ábyrgdina av at Barnaverndartænastan er ein vælvirkandi tænastudepil
- leiðarin hevur ábyrgdina av at tryggja eitt vælvirkandi tvørfakligt samstarv við tey fakfólk í økinum, ið vara av børnum og ungum
- málsviðgerð av Barnaverndarmálum
- umsiting av børnum við serligum tørvi, sbrt. § 5 í dagstovnalógini

**Førleikakrøv:**
- *hóskandi ástøðiliga útbúgving*
- kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt
- leiðsluroyndir ein fyrimunur
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður lønt í samsvari við fakligan førleika og royndir.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi 07/07-08 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jónley Poulsen, virkandi leiðara, tlf. 213960 ella Karl Olsen, Bygdarráðsformann, tlf. 230114.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

Hammershaimbsvegur 1 • Postrúm 19 • 360 Sandavágur
Tlf. 333 960 • Fartlf. 213 960 • E-mail bvt@sandavagur.fo



SUNDA KOMMUNA

## Lærarastørv í Hósvíkar skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**

- 2 lærarar í fast starv frá 1. august 2008.
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og lækkað tímatal. Starvið er uml. 11 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 29.2

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni kl. 12.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Eydnu M. Midjord, skúlaleiða, á tlf. 422259 ella 772024.

**Hósvíkar skúli**
Vørðuvegur 5 · 420 Hósvík

**Hósvíkar skúli** er ein 3 flokkaður skúli við undirvísing í 1.- 7. árgang. Komandi skúlaár verða 5 lærarar og uml. 42 næmingar í skúlanum.



Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Bilur til Sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.




**Ring 284444**